Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jóhannis Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Bussleið úr Vágum til Miðnám í Vestmanna

Spurningur:

1. Er ætlanin at skipa eina beinleiðis bussrutu úr Vágum til Miðnám í Vestmanna?

Viðmerkingar:
Ein bussruta er sett at koyra beinleiðis úr Vágum til Glasir í Tórshavn. Rættiliga nógvir næmingar úr Vágum ganga á Miðnámi í Vestmanna. Í vetur ganga 30 næmingar úr Vágum á Miðnámi í Vestmanna. Tí kann hetta vera grundarlag fyri eini beinleiðis bussrutu til og frá skúlanum. Óvist er tó, hvør ætlanin er hesum viðvíkjandi. Fyri at fáa greiðu á hesum viðurskiftum, verður hesin fyrispurningur settur landstýrismanninum.

Á Løgtingi, 24. august 2021

Jóhannis Joensen